


## KOMANDI TILTØK

9. september koma landsstýrisfólkini, Høgni Hoydal, Kristina Háfoss og Sirið Stenberg á vitjan.

17. september skipar Sendistovan saman við løgtingsins mentanar-nevnd fyri kunningar-fundi við føroyingum, sum lesa í Íslandi

19. september vitjar løgtingsins mentanar-nevnd Sendistovuna og sendimaður greiðir frá virksemi o.ø. hjá Sendistovuni.




*Mynd 1. Seinastu tríggjar veljarakanningarnar vigaðar saman. Heimild: kosningaspa.is*

## ALTINGSVALIÐ VERÐUR VÆNTANDI 29. OKTOBER.

Sigurður Ingi Jóhannsson, forsætisráðharri hevur lagt lógaruppskot fram um, at verandi tingseta endar 29. oktober. Val eigur at verða skrivað út í seinasta lagi 45 dagar undan valinum, og tí verður roknað við, at seinasti tingdagur verður 15. september.

> *» Valið átti ikki at vera fyrr enn á vári næsta ár, men orsakað av Panama-skjølunum, so noyddist táverandi forsætisráðharri, Sigmundur Davíð Gunnlaugsson, at leggja frá sær. Hetta skapti nógv órógv og tískil var avrátt, at Altingsvalið skuldi skrivast út í heyst.«*

Verandi samgonga millum Framsóknarflokkin og Sjálfstæðisflokkin hevur 38 tinglimir – 19 tinglimir í part – av 63. Seinastu veljarakanningarnar vísa, at Sjálfstæðisflokkurin gongur fram og fær nú 28,2% (við seinasta val í 2013 fekk flokkurin 24%), meðan Framsóknarflokkurin gongur nógv aftur og fær nú bert 10,7% (í 2013 fekk flokkurin 27%). Sigmundur Davíð Gunnlaugsson, fyrrv. forsætisráðharri, er úr Framsóknarflokkinum. Verður valúrslitið soleiðis, sum veljarakanningarnar vísa, so verður ikki gjørligt hjá hesum báðum flokkunum, at skipa eina meirilutastjórn.

Størsti flokkurin, sambært seinastu veljarakanningini, verður Píratar, sum eftir núverandi útliti, fáa 29,5% av atkvøðunum (við valið í 2013 fekk flokkurin 5%). Flokkurin stillaði upp fyrstu ferð til seinasta val. Út frá seinastu veljarakanningini, so fáa Sjálfstæðisflokkurin og Píratar samanlagt 57,7% av atkvøðunum. Formaðurin í Sjálfstæðisflokkinum – Bjarni Benediktsson, fíggjarmálaráðharri – er sera ivingarsamur um eina slíka samgongu.

Sum veljarakanningarnar vísa, kann tað gerast ein avbjóðing, at skipa samgongu eftir valið. Tá ið hugt verður at nýggjastu veljarakanningini, vigað saman við undanfarnu trimum kanningum, verður mett, at úrslitið kemur at síggja út sum víst til vinstru.

## ØKT SAMSTARV MILLUM ÍSLAND OG NIGERIA.



*Mynd 2. Lilja Alfreðsdóttir, uttanríkis-ráðharri Íslands og Geoffrey Jideofor Kwusike Onyeama, uttanríkisráðharri Nigeria eftir loknum fundi í Abuja í Nigeriu.*

Íslendski uttanríkisráðharrin, Lilja Alfreðsdóttir, var í seinastu viku á almennari vitjan í Nigeria, har hon hitti fýra ráðharrar úr Nigeriansku stjórnini. Formligt samstarvsøki viðv. handli millum Ísland og Nigeria er í eygsjón, eftir at nigerianski uttanríkisráðharrin á fundi teirra, segði seg stuðla uppskotinum hjá Lilju Alfreðsdóttur um samstarv. Endamálið er at styrkja handilssambandið millum londini, vaksa um handilin sínámillum, og at kanna møguleikan fyri at útflyta íslendskar uppfinningar til Nigeria, m.a. tekniskar loysnir innan fiskivinnu og útgerð.

Nigeria hevur leingi verið ein týðandi marknaður fyri turkaðan fisk úr Íslandi. Síðani 2010, hevur Ísland útflutt vørur til Nigeria fyri 75 mia. ISK (4,2 mia. DKK). Útflutningsvirðið seinasta ár var 13,8 mia. ISK (≈800 mió. DKK), og Nigeria er næststørsti útflutningsmarknaður fyri íslendskan fiskaúrdrátt uttan fyri Evropa, næst eftir USA. Hetta hevur tí stóran týdning fyri Ísland. Í ár er útflutningurin tó minkaður um gott 60%, vegna stórar búskaparligar trupulleikar í Nigeria. Lilja sigur, at økta samstarvið hevur stóran áhuga hjá báðum pørtum, tí Nigeria hyggur at góða úrslitinum hjá Íslandi av at fullnýta fiskavøru, og har eru góðir møguleikar hjá íslendskum fyritøkum innan vitan og nýskapan.

Lilja Alfreðsdóttir hitti landsbankastjóran í Nigeria, og eisini keyparar av íslendskari vøru. Við henni á ferðini, vóru umboð fyri tær fyritøkur, ið framleiða og selja turkaðan íslendskan fisk til Nigeria, sendiharri Íslands í Nigeria, og umboð fyri samtak av fyritøkum innan fiskivinnu.

*Sí meira her (á íslendskum)*

## ÍSLAND HEVUR SETT EITT NATIONALT TRYGDARRÁÐ Á STOVN



*Mynd 3. Íslendska forsætisráðið.*

Altingið hevur samtykt eina lóg um tjóðartrygdarráð, sum t.d. skal kanna, hvussu Ísland fremur sín uttanríkispolitikk og skal tæna sum eitt forum fyri nationalar trygdarspurningar. Ætlanin við Trygdarráðnum er, at meta um støðuna og útlitini í trygdar- og verjumálum, eins og at røða um onnur mál, sum hava við landsins trygd at gera.

Trygdarráðið, ið hevur 11 limir, verður mannað av forsætisráðharranum, sum er formaður, uttanríkisráðharranum, innanríkisráðharranum og aðalstjórunum í hesum stjórnarráðum. Tvey pláss fara til altingslimir – ein frá samgonguni og ein frá andstøðuni. Seinastu trý plássini fara til stjóran í íslendsku bjargingartænastuni (Landhelgisgæsla Íslands), ríkisløgreglustjóran og umboð fyri felagið fyri íslendsk bjargingarfeløg (Landsbjörg).

Lilja Alfreðsdóttir, uttanríkisráðharri, boðaði frá at tjóðartrygdarráðið skal samstarva við universitetsumhvørvið, serfrøðingabólkar og fjølmiðlar, og menna eitt opið og demokratiskt kjak um national trygdarviðurskifti. Eisini skal ráðið hvørt ár kunna Altingið um íverksetan av nationalum trygdarpolitikki, og kunna uttanlandsnevndina um eitthvørt, sum kann ávirka trygdarpolitikkin og íverksetanina av honum.

*Sí meira her (á íslendskum)*

## FØROYSKUR VINUR Í NEYÐINI



# Færeyskur haukur í horni

Eftir Lil[illegible]. Alfreðsdóttur

Færeyingar hafa lengi verið hliðhollir Íslendingum. Þessi bræðra- og nágrannaþjóð var fljót að hlaupa undir bagga með okkur haustið 2008 og nú síðast var velviljinn greinilegur þegar Færeyingar þustu út á götur í sumar til að styðja íslenska karlalandsliðið í knattspyrnu. Það er því með nokkurri eftirvæntingu sem ég held á morgun til fundar við Poul Michelsen, utanríkisráðherra Færeyja.

Samskipti Íslands og Færeyja eru ekki aðeins menningar-, sögu- og tilfinningaleg heldur einnig viðskiptaleg. Þjóðirnar hafa horft hvor til annarrar í atvinnumálum og viðskipti okkar á milli hafa smám saman vaxið. Þau eru römmuð inn af fríverslunarsamningi, sem undirritaður var í Hoyvík í Færeyjum haustið 2005. Hoyvíkur-samningurinn tekur til vöru- og þjónustuviðskipta, frjálsrar farar fólks og búseturéttar, fjármagnsflutninga, fjárfestinga og fleiri þátta.

Reynslan af Hoyvíkur-samningnum hefur almennt verið góð. Í einhverjum tilvikum hafa þó ákvæði í honum rekist á við EES-samninginn, sem setur viðskiptum milli Íslands og Færeyja ákveðnar skorður. Í þeim tilvikum hafa ráðamenn sest yfir málin og oftar en ekki fundið viðunandi lausnir. Enn bíða þó nokkur mál úrlausnar, sem við höfum einlægan áhuga á að leysa farsællega.

Lilja Alfreðsdóttir

Í ferðinni til Færeyja gefst kærkomið tækifæri til að styrkja samstarf okkar við aðra vina- og nágrannaþjóð því Vittus Qujaukistoq, utanríkisráðherra Grænlands, er þar staddur. Ráðherratríóið mun hittast til að fara yfir sameiginleg hagsmunamál landanna þriggja, sem hafa á undanförnum árum aukið samstarf sín á milli m.a. undir hatti Vestnorræna ráðsins.

» Samskipti Íslands og Færeyja eru ekki aðeins menningar-, sögu- og tilfinningaleg heldur einnig viðskiptaleg.

Alþingi Íslendinga samþykkti nýverið þingsályktun þar sem skorað er á ríkisstjórnina að skipa, ásamt landsstjórnum Færeyja og Grænlands, vinnuhóp sérfræðinga landanna þriggja til að greina sameiginlegan ávinning af vestnorrænum fríverslunarsamningi og vestnorrænu viðskiptaráði. Sambærileg þingsályktun hefur verið samþykkt bæði í Færeyjum og á Grænlandi. Þessi tillaga verður rædd á fundi okkar á morgun. Það er von mín, að við náum að ýta málinu úr vör og það megi verða upphafið að nýjum kafla í viðskiptasögu þjóðanna.

Höfundur er utanríkisráðherra.

Í sambandi við ferð sína til Føroyar, skrivaði íslendski uttanríkisráðharrin, Lilja Alfreðsdóttir, grein í Morgunblaðið, har hon tosar um samskiftini millum Ísland og Føroyar og sigur, at tey eru ikki bert mentanar-, søgu- og kenslulig, men eisini handilslig. Lilja sigur, at royndirnar við Hoyvíkssáttmálanum, ið varð undirritaður á heysti 2005, hava sum heild verið góðar, tó at onkrar treytir í honum hava verið í stríð við EBS sáttmálan.

Lilja sigur, at føroyingar leingi hava víst íslendingum góðvild. Henda brøðra- og grannatjóð var skjót at rætta fram eina hjálpandi hond á heysti 2008, tá kreppan brast á, og nú seinast, í summar, var vælvildin eyðsýnd, tá føroyingar tustu út á gøturnar, fyri at stuðla íslendska landsliðnum í fótbólti.

Av tí at uttanríkisráðharrin í Grønlandi, Vittus Qujaukistoq, eisini var við á ferðini til Føroyar, væntaði Lilja, at hetta fór at geva ein møguleika fyri at styrkja um samstarvið við aðrar vina- og grannatjóðir.

Ráðharratrioin skuldi hittast og tosa um felags áhugamál hjá hesum trimum londum, ið undanfarnu ár hava økt munandi um samstarvið gjøgnum Útnorðurráðið.

*Sí meira* *her* *(á íslendskum)*

## ÍSLENSKA KRÓNAN FER VALLA AT FLÓTA FRÍTT AFTUR



*Mynd 4. Íslendski fíggjarmálaráðharrin Bjarni Benediktsson.*

Íslendski fíggjarmálaráðharrin, Bjarni Benediktsson, sigur, at sjálvt eftir at kapitaleftirlitið er tikið av, so er tað lítið sannlíkt, at íslendska krónan verður eitt fult frítt flótandi gjaldoyra. Tað vildi ikki verið klókt.
Tað sum um ræður, er stabilitetur, tá kapitaleftirlitið verður avtikið, og samstundis at halda lágar rentur, lága inflasjón, stórt tal av arbeiðsplássum og at tryggja kappingarførið hjá Íslandi.

Fíggjarligar mátingar og eftirlit, sum skulu minka um vandan við fíggjarligu skipanini, fara at halda fram eftir at kapitaleftirlitið er tikið av, tí tað skal tryggja, at útlendskir íleggjarar hava langtíðar áhuga og ikki bert eru úti eftir stutttíðar vinningi.

*Sí meira* *her* *(á enskum)*

## MOODY´S HÆKKAR KREDITTVIRÐI ÍSLANDS VIÐ 2 STIGUM




Moody´s hevur hækkað kredittvirði hjá Íslandi frá Baa2 til A3 við støðugum útliti. A3 er 7. hægsta flokking. Í seinastu meting– 5. august 2016 – gav Moody´s Føroyum somu flokking, Aa3 við støðugum útliti, eins og undanfarna ár. Aa3 er 4. hægsta flokking.
Orsøkirnar til hækkaða kredittvirðið hjá Íslandi er í høvuðsheitum:

1) Stóra lækkingin í skuldini hjá Íslandi. Almenna skuldin hjá Íslandi væntast at lækka til undir 50% av BTÚ í endanum av 2017, og lækkar til uml. 40% av BTÚ í 2020. Í 2015 var skuldin 68,5% av BTÚ. Moody´s roknar við, at búskaparvøksturin í 2016 verður 5% og 3,9% í 2017.
2) Moody´s roknar við, at stigvísa avtøkan av kapitaleftirlitinum fer at gangast væl, og fer ikki at órógva búskapin og fíggjarliga støðufestið.
BTÚ fyri hvønn íbúgva (PPP) var 46.097 USD í 2015. Real vøksturin í BTÚ var 4% í 2015, meðan inflasjónin var 1,9% í 2015.

*Sí meira* *her* *(á enskum)*

## STIGVÍS AVTØKA AV KAPITALBINDINGUNUM.




Ísland hevur havt ávísar bindingar á fíggjarøkinum síðan kreppuna í 2009. Hesar eru millum annað, avmarkingar at keypa og útflyta útlendskt gjaldoyra, avmarkingar at gera útlendskar íløgur og avmarkingar at flyta pengar millum Ísland og umheimin. Íslendska stjórnin vil nú loysa upp um bindingarnar, men stigvíst. T.d. vera íløgur uttanlands óavmarkaðar, men skulu góðkennast av Seðlabankanum. Íløgur í fíggjarligum stýringsamboðum, gjørdar í útlendskum gjaldoyra, verða loyvdar upp til 30 mió. ISK (≈1,7 mió. DKK), og frá 1. januar 2017 upp til 100 mió. ISK(≈5,7 mió. DKK). Íslendska stjórnin hevur ætlanir um at taka umleið 70% av avmarkingunum burtur, og sostatt verður mett, at tær einans fara at raka 3% av íslendska fólkinum í framtíðini.

*Sí meira her (á enskum)*

## NÝGGJ LÓG UM FYRSTA ÍBÚÐARKEYP




Íslendska stjórnin hevur lagt fram eitt lógaruppskot, um stuðul til keyp av fyrstu íbúð. Verður uppskotið samtykt, verður lættari hjá nýggjum keyparum á húsamarknaðinum, at keypa og gjalda fyri íbúðir.

Frá 2005 til 2014, vaks lutfalsliga talið á ungum fólki á leigumarknaðinum úr 12% í 31%. Harafturat er tað meira vanligt í dag, at fólk millum 25 og 29 ár búgva heima hjá foreldrunum, enn fyri tíggju árum síðani. Endamálið við uppskotinum er tí, at hjálpa ungum at fáa egnan bústað, við at eggja teimum at spara upp til húsakeyp, og at lætta um fyrsta keypið. Harumframt hevur tað eisini við sær ein stuðul til teirra, ið ynskja at taka vanligt lán, sum ikki er prístalsbundið.

Uppskotið heimilar, at ung kunnu gera eina seruppsparing, har inngjaldið hjá hvørjum einstøkum kann verða upp til 5 mió. ISK (≈280.000 DKK) yvir eitt tíggju ára tíðarskeið, og 10 mió ISK (≈560.000 DKK) fyri pør. Fyri tey, ið ikki longu hava seruppsparing, kann henda avgerð um at spara, og at brúka uppsparingina til íbúðarkeyp, svara til umleið eina 3% lønarhækking í 10 ár, vegna umlegging av skatti og mótgjald frá arbeiðsgevara.

## HÁSKÓLI ÍSLANDS TEKUR Í ÁR Í MÓTI 1.150 ÚTLENDSKUM LESANDI.



Í hesum lestrarári bjóðar Háskóli Íslands 1.150 útlendingum vælkomnum til lestur. Talið av útlendingum, sum lesa er alsamt vaksandi. Í 2014 vóru tað 1.069 lesandi, í 2015 var talan um 1.105 útlendingar, sum lósu á Háskóla Íslands. Í ár koma útlendingarnir fyrst og fremst úr Týsklandi.
Eisini er talan um størsta tal av útlendingum, sum lesa í Háskóla Reykjavíkar, ella umleið 200. Í Háskólanum í Akureyri er tó talan um eitt lítið fall frá 85 í fjør til 75 í ár.



## MENTANARNÁTT Í SENDISTOVUNI OG Í HØRPU

20. august 2016 skipaði Sendistovan fyri einari hugnaløtu í sambandi við Menningarnótt 2016. Menningarnótt í Reykjavík er eitt afturvendandi tiltak á hvørjum ári, har allur býurin er fullur av ymiskum mentanartiltøkum frá morgni til myrkurs, og sum sendistovan hevur verið partur av síðani 2011. Í ár bjóðaðu vit inn til tónleik, list og føroyskan mat á sendistovuni, og øll hugnaðu sær saman, við tónleiki frá Anniku Hoydal, og føroyskum mati, ið Marentza Poulsen borðreiddi. Lagið var sera gott í góðveðrinum. Farið varð uppá gólv og trivið varð í fleiri kvæði. Harumframt skipaði sendistovan fyri konsertum í Hørpu, við Anniku Hoydal, Jógvan Joensen og Døgg Nónsgjógv. Tiltøkini vóru sera væl vitjað, umleið 500 gestir á sendistovuni og eini 300 í Hørpu, bæði føroyskir og útlendskir.



## VITJAN AV 30 NORDPLUS NÆMINGUM AV KAMBSDALI

26. august hevði sendistovan vitjan av næmingum frá Miðnám á Kambsdali, sum høvdu verið á ferð í Grønlandi og Íslandi, í sambandi við Nord-plus skúlasamstarv. Sendimaðurin, Petur Petersen, tók ímóti og greiddi frá um virksemið hjá Sendistovuni og um íslendsk viðurskifti. Jóannes Næs Petersen og Dánjal Petur Højgaard, lærarar vóru við næmingunum.
Næmingarnir og lærararnir settu fleiri spurningar og nakað av kjaki fór eisini fram, serliga um ferðavinnuna og búskapin í Íslandi.

**SENDISTOVA FØROYA Í REYKJAVÍK**
**TÚNGATA 14**
**101 REYKJAVÍK**

Tlf. +354 511 3200 T-postur: reykjavik@uvmr.fo
www.uvmr.fo Finn okkum á Facebook